# Góður matur úr bestu ráværuni



*Leif Sørensen, her saman við soninum Tóka, hevur í eina tíð arbeitt við nýggju matstovuni. Nú gerst dreymurin veruleiki, so skjótt sum myndugleikarnir koma við endaligu góðkenningini*

**Nýggj matstova við heitinum "Gourmet" letur upp í næstum, har dentur verður lagdur á at matur skal gerast ein heildar-uppliving**

MATUR
*Snorri Brend*
*Myndir: Jan Müller*

**Havn:** Nú verður ikki leingi at bíða hjá teimum, sum seta prís uppá góðan mat í eini góðari matstovu og í einum góðum umhvørvi.

Leif Sørensen hevur í eina tíð arbeitt við at fyrireika løtuna, tá matstova hansara skal lata upp miðskeiðis í Havnini.

Nú bíðar hann bert eftir endaligu góðkenningini fra myndugleikunum, áðrenn hann kann bjóða fyrstu gestunum innar í matstovuna "Gourmet" at royna nakað av tí, sum hann og hansara menn kunnu borðreiða við.

Henda nýggja matstovan varð royndarkoyrd hóskvøldið fyri innbodnum, og sum skilst vóru fólk sera væl nøgd við tað, tey fingu at eta.

Eitt av endamálum hansara er júst at vísa føroyingum á, at ein kann fara út at eta serliga væl gjørdan mat, og sum er gjørdur burtur úr teirri allarbestu ráværuni.

Tað er tí ikki at taka seg aftur í, at endamálið hjá Leif er at fáa fólk at skilja – og smakka! – at matur skal gerast ein heildaruppliving. Eitt stað, har góður matur, gott umhvørvi og gott útsýni veruliga geva fólki nakað fyri peningin.

Sum myndirnar so greitt vísa, er hvør einasti sentimetur í matstovuni merktur av nágreiniligari planlegging, har einki er yvirlatið til tilvildina.

So er bert eftir at vóna, at undirtøkan verður hareftir.



*Umhvørvið í eini matstovu er av stórum týdningi fyri heildarupplivingini at vitjanini. Hetta hevur eisini fingið stóra ávirkan á innrættingina av matstovuni*


**Havnar Bio**

kall Coca-Cola




**xXx 2** FRUMSÝNING

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 10.06 | kl. 23.15 |
| Leygardag | 11.06 | kl. 23.15 |
| Sunnudag | 12.06 | kl. 22.45 |




**Million Dollar Baby** FRUMSÝNING

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 10.06 | kl. 20.45 |
| Leygardag | 11.06 | kl. 20.45 |
| Sunnudag | 12.06 | kl. 20.15 |




**Elitepædagogen**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 10.06 | kl. 18.45 | kl. 21.00 |
| Leygardag | 11.06 | kl. 18.45 | kl. 21.00 |
| Sunnudag | 12.06 | kl. 18.15 | kl. 20.30 |




**Boogeyman**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 10.06 | kl. 23.30 |
| Leygardag | 11.06 | kl. 23.30 |
| Sunnudag | 12.06 | kl. 23.00 |




**Tolken**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 10.06 | kl. 18.15 |
| Leygardag | 11.06 | kl. 18.15 |
| Sunnudag | 12.06 | kl. 17.45 |

**Komandi filmur**




**Mr. & Mrs. Smith** FRUMSÝNING

| | |
|---|---|
| Fríggjadag | 17.06 |

**www.bio.fo • Telefon 31 19 56**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**